Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	04.11.2025
Mál nr.:	24/11656
Málsviðgjørt:	JAK, HP
Ummælistíð:	07.08.2025- 04.09.2025
Eftirkannað:	18.09.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
(Heitið á løgtingslógini verður broytt, løgtingslógin fær stytt heiti, ein tøknilig broyting, og reglur um endurgjald til smærri vinnurekandi fyri lønarútreiðslur til starvsmenn, sum hava verið óarbeiðsførir vegna sjúku longur enn 4 vikur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 151 frá 19. desember 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg**
um
dagpening vegna sjúku o.a."

2. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett:

"**(Sjúkradagpeningalógin)**"

3. Í § 9, stk. 3 verður "fer í grunn" broytt til: "fer á frítíðarlønarkontu".

4. Aftan á § 13 verður sum kapittul 6 a sett:

"**Kapittul 6 a**
Endurgjald til privatar arbeiðsgevarar

§ 13 a. Privatur arbeiðsgevari, ið seinast álíknaða inntøkuár hevur útgoldið í mesta lagi 4 mió. kr. í lønum, kann søkja um at fáa endurgoldnar lønarútreiðslur til ein starvsmann sambært løgtingslóg um starvsmenn, ið hevur verið óarbeiðsførur vegna sjúku longur enn 4 vikur.
Stk. 2. Endurgjaldið verður gjørt upp eftir reglunum í kapittul 4 í

løgtingslógini og verður bara veitt fyri tíðarskeiðið, sum fer út um 4 vikur.

§ 13 b. Markið fyri útgoldnar lønir í § 13 a, 1. pkt. verður javnað tann 1. januar á hvørjum ári við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag árið frammanundan.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Privatir arbeiðsgevarar hava sambært § 5, stk. 1 í løgtingslóg um starvsmenn skyldu at rinda einum starvsmanni fulla løn undir sjúku, og starvsmenn eru av hesi orsøk ikki fevndir av dagpeningaskipanini.

Um ein starvsmaður hjá privatum arbeiðsgevara verður langtíðarsjúkur, hevur arbeiðsgevarin, við uppsøgn av starvsmanninum, alt eftir hvussu leingi starvsmaðurin hevur verið í starvi, skyldu at rinda viðkomandi løn í upp til 6 mánaðir, og arbeiðsgevarin hevur ongan rætt at fáa nakran part av lønarútreiðslunum endurgoldnan.

Fyri smærri vinnurekandi, sum hava fá starvsfólk í starvi, kann hetta raka hart fíggjarliga. Í summum førum er neyðugt hjá tí vinnurekandi at seta ein avloysara í starvið, ella rinda einum øðrum fyri at loysa uppgávurnar hjá tí langtíðarsjúka, soleiðis at tann vinnurekandi má rinda dupulta løn í eitt tíðarskeið. Dømi eru um smáar fyritøkur, sum eru komnar í fíggjarligt óføri av hesum.

Sambært samgonguskjalinum skal rætturin hjá smærri vinnurekandi til sosialar skipanir, eitt nú sjúkradagpening, endurskoðast. Við uppskotinum tekur landsstýrismaðurin tí stig til at geva smærri vinnurekandi møguleika at fáa endurgoldnan ein part av lønarútreiðslunum til starvsmenn, ið verða langtíðarsjúkir.

Í løtuni eru eingi amboð at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av eini tílíkari endurgjaldsskipan, og uppskotið leggur tí upp til, at tað verður lagt varisliga frá landi.

Skipanin við endurgjaldi verður tí í fyrstu atløgu bara galdandi fyri smærri vinnurekandi, sum seinast álíknaða inntøkuár ikki hava havt samlaðar lønarútreiðslur fyri meira enn 4 mió. kr.

1.2. Galdandi lóggáva

Sambært § 2, stk. 3 í løgtingslógini verður dagpeningur ikki veittur, um tann sjúki sambært lóg, trygging ella sáttmála hevur rætt til løn undir sjúku.

Privatir arbeiðsgevarar hava sambært § 5, stk. 1 í løgtingslóg um starvsmenn skyldu at rinda einum starvsmanni fulla løn undir sjúku. Starvsmenn eru tí ikki fevndir av sjúkradagpeningaskipanini, og arbeiðsgevarar hava í dag ongan rætt at fáa endurgoldnan nakran part av lønarútreiðslunum, sum teir skulu rinda einum sjúkum starvsmanni.

Sambært § 9, stk. 3 í løgtingslógini skal frítíðarløn, sum verður veitt aftrat dagpeningaveitingini, flytast í ein grunn (Frítíðargrunnin). Frítíðargrunnurin er ikki til longur, og í dag verður frítíðarløn flutt á eina frítíðarløn arkontu, sum TAKS umsitur.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at fyribyrgja støður, har smærri vinnurekandi koma í fíggjarligt óføri, tí ein starvsmaður hjá fyritøkuni verður langtíðarsjúkur.

Tað meira yvirskipaða endamálið er at geva smærri vinnurekandi í Føroyum betri treytir at virka og menna seg undir.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við lógaruppskotinum fáa smærri vinnurekandi rætt at fáa endurgoldnan ein part av lønarútreiðslunum til ein starvsmann, ið hevur verið sjúkur longur enn 4 vikur.

Endurgjaldið til arbeiðsgevaran verður ásett eftir §§ 8-9 í løgtingslógini. Í høvuðsheitum merkir hetta, at endurgjaldsupphæddin er avmarkað til 80 % av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum, rundað til nærmastu heilu krónuupphædd.

Tann vinnurekandi kann við øðrum orðum í mesta lagi fáa endurgoldið tað, ið svarar til 80 % av eini *arbeiðsmannaløn*.

Skipanin við endurgjaldi er avmarkað til smærri vinnurekandi, sum seinast álíknaða inntøkuár hava havt samlaðar lønarútreiðslur fyri í mesta lagi 4 mió. kr.

Við lógaruppskotinum verður eisini gjørd ein tøknilig broyting í § 9, stk. 3. Harafturat verður heitið á løgtingslógini broytt, eins og skotið verður upp at geva løgtingslógini eitt stytt heiti.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri í tíðarskeiðinum 7. august til 4. september 2025.

Lógaruppskotið hevur harafturat í sama tíðarskeið verið til ummælis hjá:

- Stjórnarráðunum,
- Vinnuhúsinum,
- Samverk,
- Starvsfelagnum,
- Almannaverkinum, og
- Føroya Kærustovni

Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Heilsumálaráðið hava sent Almanna- og mentamálaráðnum ummælisskriv, har tey boða frá, at ráðini ikki hava viðmerkingar til lógaruppskotið.

Samverk, Umhvørvismálaráðið, Føroya Arbeiðsgevarafelag og MEGD hava sent Almanna- og mentamálaráðnum viðmerkingar til lógaruppskotið.

Samverk vísir í ummælinum á, at lógaruppskotið kann vera við til at skeikla kappingina millum ymiskar arbeiðsgevarar innan økið hjá Samverk. Orsøkin til hetta er, at tað eru stórir arbeiðsgevarar, sum hava stovnað eitt partafelag ella smápartafelag fyri hvønn matvøruhandil sær, meðan aðrir arbeiðsgevarar hava allar matvøruhandlarnar í einum og sama felagi. Arbeiðsgevarin, sum hevur allar matvøruhandlarnar í einum felagi, fer sannlíkt ikki at koma undir endurgjaldsskipanina, sum lógaruppskotið leggur upp til, tí samlaðu lønarútreiðslurnar eru ov stórar. Arbeiðsgevarin, ið hevur stovnað eitt felag til hvønn handil, fer í prinsippinum at kunna fáa endurgjald fyri allar handlarnar.

Almanna- og mentamálaráðið skal í hesum sambandi viðmerkja, at endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja smærri arbeiðsgevarum møguleika at fáa endurgoldnar lønarútreiðslur til langtíðarsjúkar starvsmenn. Orsøkin til, at atgongdin til endurgjald í fyrstu atløgu er avmarkað til smærri arbeiðsgevarar, er, at hesar fyritøkurnar eru tær mest viðbreknu. Sum víst verður á í uppskotinum, er neyðugt at leggja varisliga frá landi, tí í løtuni eru eingi amboð til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av eini tílíkari endurgjaldsskipan. Møguleiki er tó fyri seinni at víðka endurgjaldsskipanina, soleiðis at hon eisini fer at fevna um aðrar, størri fyritøkur. Við hesum uppskotinum fáa handlarnir, sum eru skipaðir sum smærri sjálvstøðug feløg, møguliga ein ávísan fyrimun – í tann mun teir lúka treytirnar fyri endurgjaldi – men tað kunnu eisini vera aðrir stórrakstrar-fyrimunir við at hava allar handlarnar í einum og sama felagi. Undir øllum umstøðum verður ikki mett, at talan er um nakra ógvusliga skeiklan av kappingini millum teir arbeiðsgevararnar, ið verða nevndir í ummælisskrivinum hjá Samverk. **Almanna- og mentamálaráðið** metir tí samanumtikið, at viðmerkingarnar frá Samverk ikki eru orsøk til at gera broytingar í skipanini, sum lógaruppskotið leggur upp til skal vera galdandi í fyrstu atløgu.

Ummælið hjá **Umhvørvismálaráðnum** hevur sum tað fyrsta ymiskar málsligar og tøkniligar viðmerkingar til lógaruppskotið, harav tær flestu eru tiknar til eftirtektar. Í ummælinum vísir **Umhvørvismálaráðið** eisini á ymisk ivamál í galdandi løgtingslóg, sum møguliga kundu verðið loyst í sambandi við hetta lógaruppskotið. **Almanna- og mentamálaráðið** fer saman við Almannaverkinum at hyggja nærri at hesum ivamálum, men møguligar broytingar verða ikki tiknar við í hetta lógaruppskotið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ummælinum ta viðmerking, at lógarteksturin kann skiljast soleiðis, at arbeiðsgevarin kann fáa endurgjald fyri alt tíðarskeiðið og ikki bara fyri tann partin av tíðarskeiðinum, sum fer út um 4 vikur. **Almanna- og mentamálaráðið** hevur tí broytt lógartekstin, soleiðis at tað ikki longur kann vera nakar ivi um, at arbeiðsgevarin bara kann fáa endurgjald fyri tann partin av tíðarskeiðinum, sum fer út um 4 vikur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir somuleiðis á, at markið upp á 4 mió. kr. er ov avmarkandi og eigur at verða hækkað. Eisini vísir Føroya Arbeiðsgevarafelag á, at ein skipan við stigvísum endurgjaldi hevði verið rættari, heldur enn at fyritøkur, sum seinast álíknaða inntøkuár hava havt t.d. 4,01 mió. kr. í lønarútreiðslum, ikki hava nakran rætt til endurgjald. **Almanna- og mentamálaráðið** skal í hesum sambandi endurtaka, at endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja smærri arbeiðsgevarum møguleika at fáa endurgoldnar lønarútreiðslur til langtíðarsjúkar starvsmenn. Orsøkin til, at atgongdin til endurgjald í fyrstu atløgu er avmarkað til smærri arbeiðsgevarar, er, at hesar fyritøkurnar eru tær mest viðbreknu. Sum víst verður á í uppskotinum, er neyðugt at leggja varisliga frá landi, tí í løtuni eru eingi amboð til at meta um

fíggjarligu avleiðingarnar av eini tílíkari endurgjaldsskipan. Møguleiki er tó fyri seinni at víðka endurgjaldsskipanina, soleiðis at hon eisini fer at fevna um aðrar, størri fyritøkur.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur at enda eina viðmerking um, at viðmerkingarnar til lógaruppskotið eiga at gera greitt, um nevndarsamsýning/løn skal roknast við í samlaðu lønarútreiðslurnar hjá fyritøkuni. **Almanna- og mentamálaráðið** hevur tí gjørt greitt í viðmerkingunum, at samsýning/løn til nevnd skal roknast við í samlaðu lønarútreiðslurnar hjá fyritøkuni.

MEGD vísir í ummælinum á, at skipanin, sum lógaruppskotið skjýtur upp, er alt ov avmarkað, tí hon fevnir bara um smáar fyritøkur við lønarútreiðslum upp til 4 mió. kr. og ikki um fyritøkur størri enn hetta. Sambært MEGD minkar lógaruppskotið tí ikki nóg nógv um "insitamentið" hjá privatum arbeiðsgevarum at siga langtíðarsjúkar starvsmenn úr starvi.

Almanna- og mentamálaráðið skal viðmerkja, at endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja smærri arbeiðsgevarum møguleika at fáa endurgoldnar lønarútreiðslur til langtíðarsjúkar starvsmenn. Orsøkin til, at atgongdin til endurgjald í fyrstu atløgu er avmarkað til smærri arbeiðsgevarar, er, at hesar fyritøkurnar eru tær mest viðbreknu. Sum víst verður á í uppskotinum, er neyðugt at leggja varisliga frá landi, tí í løtuni eru eingi amboð til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar av eini tílíkari endurgjaldsskipan. Møguleiki er tó fyri seinni at víðka endurgjaldsskipanina, soleiðis at hon eisini fer at fevna um aðrar, størri fyritøkur.

MEGD setur eisini spurning við støddina á endurgjaldinum og longdina á tíðarskeiðinum, sum arbeiðsgevarin sjálvur skal rinda fyri. Sambært MEGD vil talan í summum førum vera um eitt "..sera avmarkað endurgjald til arbeiðsgevaran".

Hóast arbeiðsgevarin við lógaruppskotinum ikki kann fáa fult endurgjald fyri lønarútreiðslurnar, uttan so at starvsmaðurin arbeiðir niðursetta tíð, tekur **Almanna- og mentamálaráðið** ikki undir við viðmerkingini hjá MEGD um, at talan í summum førum vil vera um eitt *sera avmarkað endurgjald* til arbeiðsgevaran. Í flestu førum fer arbeiðsgevarin (aftan á 4 vikur) at kunna fáa endurgjald fyri meginpartin av lønini hjá starvsmanninum.

Viðvíkjandi longdini á tíðarskeiðinum, sum arbeiðsgevarin sjálvur má bera kostnaðin fyri, skal **Almanna- og mentamálaráðið** viðmerkja, at skipanin bara er ætlað sum ein endurgjaldsskipan fyri lønarútreiðslur til *langtíðarsjúkar* starvsmenn.

MEGD vísir eisini á, at tað í uppskotinum er trupult at fáa greiði á, um uppskotið bara fevnir um starvsmenn eftir løgtingslóg um starvsmenn, ella um tað eisini fevnir um sáttmálagjørdar starvsmenn. **Almanna- og mentamálaráðið** hevur í hesum sambandi broytt lógartekstin og serligu viðmerkingarnar til lógaruppskotið, soleiðis at tað ikki longur kann vera nakar ivi um, at uppskotið bara fevnir um starvsmenn sambært § 1 í løgtingslóg um starvsmenn.

Í ummælinum hevur **MEGD** eisini ymiskar aðrar viðmerkingar, sum **Almanna- og mentamálaráðið** ikki metir vera viðkomandi fyri lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tað ber ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið, men væntandi verða tað fáir arbeiðsgevarar, ið fara at koma undir endurgjaldsskipanina, sum lógaruppskotið skjýtur upp. Tískil verða tað væntandi eisini fáir arbeiðsgevarar, ið fara at fáa lønarútreiðslur endurgoldnar.

Hægst møguliga dagpeningaveiting frá 1. mai 2025 er 5.799 kr. um vikuna, íroknað frítíðarløn.

Tað eru bara tey, sum hava inntøku hægri enn 5.799 kr. um vikuna, sum fáa hægstu upphæddina. Dagpeningur til persón, ið arbeiðir niðursetta tíð, er sostatt vanliga lægri enn upphæddin omanfyri.

Um tað t.d. verður veitt endurgjald fyri 5 persónar um árið, sum í miðal hava inntøku uppá 5.000 kr. um vikuna, og sum í miðal eru sjúkir í 4 mánaðir, verða útreiðslur landsins knappar 500 tús. kr. til endamálið.

Harafturat skal nevnast, at av tí, at tað í verandi skipan er borgarin (løntakarin), ið stendur skrásettur sum móttakari, er neyðugt at gera eina broyting í Heildarskipanini hjá Almannaverkinum, soleiðis at arbeiðsgevarin kann verða skrásettur sum móttakari og løntakarin sum hjápartur. Almannaverkið hevur fingið veitaran av Heildarskipanini at meta um kostnaðin av hesum, og mett verður, at kostnaðurin verður millum 850 tús. kr. og 1,2 mió. kr.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Almannaverkið fer at fáa eitt í løtuni ókent tal av umsóknum aftrat at viðgera árliga. Mett verður tó, at talan verður um rættiliga fáar umsóknir, og umsitingarligu avleiðingarnar verða tí avmarkaðar.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Við lógaruppskotinum fáa smærri vinnurekandi møguleika at fáa endurgoldnan ein part av lønarútreiðslunum til ein langtíðarsjúkan starvsmann. Fyri smærri vinnurekandi, sum hava fá starvsfólk í starvi, kann hetta hava sera stóran fíggjarligan týdning, um ein starvsmaður hjá fyritøkuni verður raktur av langtíðarsjúku.

Lógaruppskotið hevur tí positivar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur positivar avleiðingar fyri langtíðarsjúkar starvsmenn hjá smærri vinnurekandi, ið sannlíkt fáa eitt sterkari tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Orsøkin er, at arbeiðsgevarar, tá teir kunnu fáa lønarútreiðslur endurgoldnar, í minni mun verða trýstir til at siga starvsmenn úr starvi, tá ið teir gerast langtíðarsjúkir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at nakar millumtjóðasáttmáli er viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Mett verður ikki, at EMRS hevur týdning fyri hetta lógaruppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Lógaruppskotið hevur ikki serligar avleiðingar fyri fólk, ið bera brek. Mett verður tí ikki, at Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, hevur týdning fyri lógaruppskotið.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ongar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum nakrar skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær omanfyri nevndu.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1

Nr. 1
Við uppskotinum til § 1, nr. 1 verður heitið á løgtingslógini broytt. Einasta broytingin í heitinum er, at styttingin "v.m.", sum ikki er góðkend stytting sambært rundskrivinum um lógarsmíð, verður broytt til góðkendu styttingina "o.a.".

Endamálið við broytingini er at fáa heitið á løgtingslógini í samsvar við rundskrivið um lógarsmíð. Broytingin hevur ongan innihaldsligan týdning.

Nr. 2
Við § 1, nr. 2 verður skotið upp, at løgtingslógin frameftir skal hava stytta heitið: "Sjúkradagpeningalógin".

Orsøkin til broytingina er, at løgtingslógin longu verður nevnd *sjúkradagpeningalógin* í vanligari talu og hevur verið nevnd soleiðis í nógv ár. Mett verður, at løgtingslógin er so mikið kend millum fólk, at tað ikki verður nakar ivi hjá nøkrum um, hvørja lóg sipað verður til, tá ið stytta heitið fer at verða brúkt. Broytingin hevur ongan innihaldsligan týdning.

Nr. 3
Frítíðarlønin hevur síðani 2022 ikki verið goldin í ein grunn (Frítíðargrunnin), men á eina frítíðarlønarkontu, sum TAKS umsitur. Tað er tí misvísandi, tá tað í § 9, stk. 3 í galdandi løgtingslóg stendur, at frítíðarlønin verður flutt í ein grunn. Tí verður hendan rættingin, sum ikki hevur nakran innihaldsligan týdning, skotin upp.

Nr. 4
Sambært § 2, stk. 3 í løgtingslógini verður dagpeningur ikki veittur, um tann sjúki sambært lóg, trygging ella sáttmála hevur rætt til løn undir sjúku.

Privatir arbeiðsgevarar hava í dag, sambært § 5, stk. 1 í løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn, skyldu at rinda einum starvsmanni fulla løn undir sjúku.

Starvsmenn eru tí ikki fevndir av sjúkradagpeningaskipanini, og arbeiðsgevarar hava í dag ongan rætt at fáa endurgoldnan nakran part av lønarútreiðslunum, sum teir skulu rinda einum starvsmanni undir sjúku.

Uppskotið til kapittul 6 a (§§ 13 a og 13 b) í lógaruppskotinum ásetur eina nýggja endurgjaldsskipan, har smærri vinnurekandi fáa møguleika at fáa endurgoldnan ein part av lønarútreiðslunum til ein starvsmann, ið hevur verið sjúkur longur enn 4 vikur.

Endamálið við endurgjaldsskipanini er at betra umstøðurnar hjá smærri vinnurekandi í Føroyum, sum ofta verða serliga hart rakt, tá ein starvsmaður hjá fyritøkuni verður raktur av langtíðarsjúku.

Niðanfyri verða høvuðstættirnir í endurgjaldsskipanini gjøgnumgingnir undir hvør sínari yvirskrift.

Ein endurgjaldsskipan til smærri vinnurekandi

Endurgjaldsskipanin sambært lógaruppskotinum er bara ætlað til *smærri vinnurekandi*. Uppskotið til § 13 a, stk. 1 ásetur tí sum treyt fyri at koma undir skipanina, at samlaðu lønarútreiðslurnar hjá fyritøkuni seinast álíknaða inntøkuár í mesta lagi hava verið 4 mió. kr.

Eru samlaðu lønarútreiðslurnar hjá fyritøkuni størri enn hetta, t.d. 4,1 mió. kr., hevur tann vinnurekandi ikki rætt at fáa lønarútreiðslurnar endurgoldnar.

Hugtakið, samlaðar lønarútreiðslur, skal skiljast breitt. Tað fevnir bæði um løn og lønargjøld so sum eftirløn, frítíðarløn, barsilsgjald, ALS-gjald, arbeiðsmarknaðareftirlønargjald og vinnusjúku- og tryggingargjald.

Lønin til stjóran í fyritøkuni skal roknast við í samlaðu lønarútreiðslurnar, eisini í teimum førum, har stjórin og eigarin av fyritøkuni er sami persónur. Hevur fyritøkan eina nevnd, skal nevndarsamsýningin á sama hátt roknast við í samlaðu lønarútreiðslurnar.

Uppskotið til § 13 b ásetur, at markið fyri samlaðar lønarútreiðslur í § 13 a, stk. 1 upp á 4 mió. kr. skal javnast á hvørjum ári við lutfalsligu lønarhækkingini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag árið frammanundan.

Starvsmenn

Endurgjaldsskipanin fevnir, sambært uppskotinum til § 13 a, stk. 1, harafturat bara um lønarútreiðslur til starvsfólk hjá privatum arbeiðsgevarum, ið hava støðu sum starvsmenn sambært løgtingslóg um starvsmenn, har hugtakið, *starvsmaður*, er skilmarkað í § 1.

Endurgjaldsskipanin fevnir ikki um starvsfólk hjá privatum arbeiðsgevarum, ið annaðhvørt við individuellari ella kollektivari avtalu hava fingið avtalaða støðu sum starvsmenn.

Langtíðarsjúka – sjúkur longur enn 4 vikur

Endurgjaldsskipanin tekur, sambært uppskotinum til § 13, stk. 1, við, tá starvsmaðurin hevur verið óarbeiðsførur vegna sjúku longur enn 4 vikur.

Hetta skal skiljast soleiðis, at tann vinnurekandi bara kann fáa endurgoldnar lønarútreiðslur fyri tíðarskeiðið, ið fer út um 4 vikur. 4 tær fyrstu vikurnar má tann vinnurekandi sostatt framvegis rinda fyri sjálvur.

At starvsmaðurin hevur verið sjúkur longur enn 4 vikur merkir, at starvsmaðurin sum meginregla skal hava verið óarbeiðsførur vegna sjúku í 4 samfeldar vikur. Kemur starvsmaðurin aftur til arbeiðis aftan á 2 vikur, men gerst sjúkur aftur nakrar fáar dagar seinni, og tað er greitt ella kann staðfestast av lækna, at talan er um somu sjúku sum áðrenn, kunnu 2 tær fyrstu vikurnar tó roknast upp í tær 4 vikurnar.

Verður starvsmaðurin sjúkur aftur aftan á fáar dagar, men talan er um aðra, nýggja sjúku, má tíðarskeiðið sum meginregla roknast av nýggjum, uttan at so at serligar umstøður tala fyri tí øvuta.

Endurgjaldið til tann vinnurekandi verður gjørt upp eftir dagatali sambært eini læknaváttan.

Endurgjaldsupphæddin

Uppskotið til § 13 a, *stk. 2* ásetur harafturat, at endurgjaldið til tann vinnurekandi skal fylgja reglunum í §§ 8-9 í løgtingslógini.

Hetta hevur í høvuðsheitum tann týdning, at endurgjaldsupphæddin er avmarkað til 80 % av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag, við tí í lóg ásetta vikutímatalinum hjá ófaklærdum, rundað til nærmastu heilu krónuupphædd. Upphæddin verður roknað á sama hátt sum í øðrum dagpeningamálum. Tað merkir, at endurgjald verður einans veitt fyri yrkadagar, og sostatt verður onki endurgjald veitt fyri frídagar og halgidagar.

Tann vinnurekandi kann við øðrum orðum í mesta lagi fáa endurgoldið tað, ið svarar til 80 % av eini *arbeiðsmannaløn*.

Hevur starvsmaðurin arbeitt fyri meira enn 80 % av eini arbeiðsmannaløn, skal tann vinnurekandi sostatt framvegis bera tann partin av lønarútreiðslunum, sum fer upp um hetta markið.

Ein sjálvsøgd treyt fyri at fáa lønarútreiðslur endurgoldnar er, at tann vinnurekandi hevur goldið starvsmanninum ta løn, sum starvsmaðurin hevur rætt til, og at lønarútgjaldið er skjalfest frá TAKS. Hevur tann vinnurekandi ikki goldið starvsmanninum lønina, er einki at endurgjalda.

Til § 2

§ 2 er gildiskomuáseting.

Meðan tað í "vanligum" sjúkradagpeningamálum er løntakarin, ið er umsøkjari/høvuðspartur, hava endurgjaldsmál sambært nýggju endurgjaldsskipanini arbeiðsgevaran sum umsøkjara/høvuðspart og løntakaran sum hjápart.

Áðrenn endurgjaldsskipanin kann setast í verk, er tí neyðugt at gera tillagingar í Heildarskipanini hjá Almannaverkinum, ið gera tað møguligt at skráseta arbeiðsgevaran sum høvuðspart og løntakaran sum hjápart.

Eisini er neyðugt at gera eitt nýtt umsóknarblað við arbeiðsgevaranum sum umsøkjara, og har starvsmaðurin gevur samtykki til, at Almannaverkið kann fáa atgongd til sjúkramelding og til inntøkuupplýsingar frá TAKS.

Fyri at geva Almannaverkinum eitt rímiligt skotbrá til at fáa hesar broytingarnar í lag, ásetur uppskotið til § 2, at løgtingslógin skal koma í gildi tann 1. januar 2026.

Endurgoldið verður fyri lønarútreiðslur frá gildiskomuni av hesi løgtingslóg.

Hevur tann vinnurekandi havt lønarútreiðslur til óarbeiðsføran starvsmann áðrenn gildiskomuna, verður hetta tíðarskeiðið tó roknað við í tær 4 vikurnar, sum tann vinnurekandi sjálvur skal rinda fyri.

Almanna- og mentamálaráðið, 4. november 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Samverk
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 7: Ummæli frá MEGD